## Tilmæli um ferðavinnu

Í morgin handar ein avbeiðsbólkur, sum Tórshavnar kommuna hevur sett, eitt tilmæli um ferðavinnu. Bólkurin hevur arbeitt við tveimum evnum: »Tilmæli um ferðavinnu í Tórshavnar kommunu« og »Støðulýsing av ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu 2006«. Úrslitið verður handað borgarstjóranum á tíðindafundi fríggjamorgunin. Arbeiðsbólkurin hevur verið mannaður av Johs. Jensen, stjóra á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn, Fríðun Hansen, Greengate, Niels Halm, Norðurlandahúsið, Hendrik Egholm, Smyril Line, Magni Arge, Atlantsflog, Jan Mortensen, Vinnuhúsið, og Bjørgfríð Ludvig, Tórshavnar kommuna. Skrivari hevur verið Randi Frederiksberg, vinnusamskipari hjá Tórshavnar kommunu. Stovnarnir, sum hava verið umboðaðir í arbeiðsbólkinum, hava eisini latið tøl til støðulýsingina um ferðavinnu í Tórshavnar kommunu.



## Drekkivatn reint

Nú er drekkivatnið í Kollafirði reint aftur, og áheitanin um at kóka vatnið, áðrenn tað verður drukkið, er tikin aftur, sigur Tórshavnar kommuna. Fyri nøkrum døgum síðan kom áheitan frá vatnverkinum í Kollafirði um at kóka drekkivatnið, tí tekniskt brek var á vatnverkinum, sum møguliga kundi hava við sær, at vatnið ikki leyk allar ásettar treytir. Brekið er nú rættað, og vatnið er reint. Tískil er ikki neyðugt at kóka drekkivatnið í Kollafirði, sigur kommunan.

# minkar um avlopið



*sum fara um tær 200.000 krónurnar, tá*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Stjørnan og Polarhav eru høvuðsgrundarlagið undir gulllaksinum hjá Tavuni. Í ár hevur felagið eisini keypt gulllaks frá Eysturbúgvanum*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*- Framleiðslan hevur gingið væl í vertíðini, men stundum hevur tað verið ein "bardagi" um at fáa nóg mikið av fólki. Tað hevur so gingið, sigur Jóan Magnus Rasmussen, stjóri á Tavuni*

Mynd: Vilmund Jacobsen

árinum, og hvussu nógv fellir inn í komandi ár.

Tað er soleiðis, at Tavan hevur leveringsavtalur við gulllaksi yvir longri tíðarskeið.

Spurdur, um felagið í Leirvík hevur merkt nakað til, at annað føroyskt felag eisini er farið at virka munandi nøgdir av gulllaksi, sigur hann.

- Nei, eg vil siga, at hetta hava vit ikki merkt nakað serligt til úti á marknaðinum, hóast hitt felagið lutvíst er á sama marknaði sum vit.

Jóan Magnus vísir á, at ein danskur bátur, sum í fleiri ár hevur veitt gulllaks, er givin av fiska vegna skerjingar, og somuleiðis hevur hann skilt, at veiðitíðin hjá norskum skipum, sum veiða gulllaks, er stytt.

### Søgan í stuttum

Tað var í 1992, at táverandi Frost byrjaði at virka fars úr gulllaksi.

Tað vóru Ingvar Joensen og Jóan Magnus Rasmussen, sum gingu á odda og slóðaðu fyri hesi framleiðslu.

Eftir 1992 endaðu flestu fiskavirki í landinum í tí tá nógv umtalaða mølposanum, og millum hesi var eisini Frost í Leirvík.

- Í 1994 sluppu vit at leiga virkið til hesa framleiðslu, og í februar mánaði 1994 sá Tavan dagsins ljós. Síðan tá hevur høvuðsframleiðslan á virkinum verið fars úr gulllaksi, sigur Jóan Magnus Rasmussen.

Ingvar Joensen hevur øll árini verið ein avgerandi primus-motorur í hesum virksemi.

Stjórin væntar ikki, at árið í ár verður eins gott og 2006.

- Ráfiskaprísirnir á gulllaksi eru lutfalsliga øktir meira enn marknaðarprísurin, lønirnar eru øktar og útreiðslurnar somuleiðis. Umleggingar av virkseminum hava eisini kostað pening. Vit vænta tískil eitt lakari ár í ár enn í fjør, men vit vóna, at tølini á botnlinjuni vera í lagi, sigur Jóan Magnus Rasmussen.

Tavan telist millum tey fiskavirki í landinum, sum gjøgnum árið hevur flestu tímarnar til arbeiðsfólkið, og tað eru ikki so fáar lønir, sum fara um tær 200.000 krónurnar, tá árið er liðið.

## Sensorar skulu siga frá fiski



*Nú ætla norðmenn at seta sensorar á havbotnin, sum kunnu siga frá, hvussu fiskastovnar eru fyri*

Norðmenn arbeiða nú við eini ætlan, har teir fara at seta sensorar á havbotnin í Barentshavinum. Hesir sensorar skulu hava eftirlit við fiskastovnunum um hesar leiðir. Vanligt er at brúka sensorar í troli, har hesir siga frá, hvussu nógvur fiskur er í trolposanum. Ætlanin hjá norðmonnum við hesi skipan er betur at kunna meta um fiskastovnarnar og soleiðis eisini betur kunna áseta kvotur. Tað er felagið Sintef, ið arbeiðir við hesi skipan, sum ætlandi kann takast í nýtslu um eini tvey ár.